## Ósemja um ES-uppskotið

Tað eydnaðist ikki uttanríkisnevndini hjá íslendska Altinginum at semjast um eitt álit um uppskotið at taka upp samráðingar við ES um limaskap. Ætlanin var, at nevndin skuldi leggja seinastu hond á álitið í gjárkvøldið og leggja tað fyri Altingið í dag, men so varð ikki. Sambært Morgunblaðnum er tað ivasamt, nær uppskotið kemur aftur úr nevndini. Tað skilst, at tað var umboðið hjá Vinstrafylkingini, sum lá í buktini, og sambært Morgunblaðnum eru umboðini hjá teimum báðum stjórnarflokkunum rættiliga ósamd um, hvat skal standa í álitinum. Uttanríkisnevndin skal halda fund aftur í dag, men íslendsku fjølmiðlarnir vænta ikki, at nakað álit kemur í dag. Ein møguleiki er, at nevndin kemur við tveimum álitum.



## Kanna veðurlag og vinnu

Nú skal kannast, um beinleiðis samband er ímillum veðurlagsbroytingar og grønlendska vinnumenning. Granskarin Rasmus Ole Rasmussen, sum starvast hjá Nordregion undir norðurlendska ráðharraráðnum, ger kanningina saman við donsku veðurstovuni DMI, sum hevur skrásett hitan í sjónum úti fyri Suður- og Eysturgrønlandi tey seinastu 50 árini. Tølini skulu so brúkast saman við einari spurnarkanning, samrøðum og fíggjarligu viðurskiftunum hjá fólki í økinum upp ígjøgnum tíðina. Rasmus Ole Rasmussen sigur við blaðið Polarfronten, at veðurlagsbroytingarnar hava ávirkan á, hvussu vinnan broytist, men at politisk tiltøk hava uppaftur størri ávirkan.

# Svend Auken innlagdur

**Krabbasjúki topp-politikarin Svend Auken datt mikudagin í summarhúsinum hjá sær og sló høvdið somikið álvarsliga, at hann nú er innlagdur á Ríkissjúkrahúsið**

Svend Auken datt um, meðan hann var inni í húsinum í Vejby. Stutt eftir varð lækni boðsendur, sum beinanvegin ringdi eftir sjúkrabili. Tað skrivaði Ekstra Bladet í gjár.

Sambært upplýsingum hjá blaðnum varð Svend Auken í fyrstu atløgu koyrdur til Hillerød sjúkrahús. Her varð staðfest at serfrøðingar skuldu kanna politikaran, og hann varð koyrdur við útrykningi til RíkissjúkrahúsiðíKeypmannahavn.

Svend Auken hevur í fleiri ár verið sjúkur av krabba í eistrunum, og hann hevur langtsíðan viðgingið at hann líður undir eini ólekiligari sjúku, ið bara verður verri og verri.

Elsti sonur Svend Auken, David Auken, váttar fyri bt.dk, at pápi hansara er innlagdur. David Auken visti tó ikki, um tað var álvarsligt, men sló fast, at innleggingin einki hevði við krabbasjúkuna at gera.

Svend Auken er kendur millum føroyingar og hevur fleiri ferðir vitjað her – seinast í oktober mánaði saman við konuni, Anne Wivel, sum hevði leikstjórnað einum filmi um Grønland til norðurlendska filmsfestivalin í Norðulandahúsinum, sum var tá.

Svend Auken er fyrrverandi formaður í danska Javnaðarflokkinum, hevur eisini verið bæði arbeiðis- og umhvørvisráðharri og er í dag 1. næstformaður í Fólkatinginum.



# Kanna føroyskar sjómenn, sum sigla í øðrum londum

**Granskingadepilin fyri Samfelagsmenning er í samstarvi við Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið farin undir kanning við heitinum "Føroyskir sjómonnum, sum sigla í øðrum londum".**

KANNING
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning er farin undir nýggja kanning. Tað fráboðar hann á heimasíðu sínari.

Nógvir føroyskir sjómenn sigla uttanlands, bæði sum fiskimenn, í handilsflotanum og innan frálandavinnuna. Teir flestu av hesum sjómonnum sigla undir sokallaðumnetto-skattaskipanunum ella eru skattaðir í landinum, har teir sigla.

Hóast hesir sjómenn ikki rindað skatt í Føroyum ella bara partvíst rindað skatt í Føroyum, so forvinna teir tó fit av peningi, sum umvegis forbrúk verður settur í umferð í føroyska samfelagnum. Á hendan hátt hava hesir sjómenn týðandi ávirkan á føroyska búskapin.

Endamálið við kanningini er at fáa staðfest fleiri viðurskifti, sum hava við føroyskar sjómenn, sum sigla í øðrum londum at gera:



- Hvussu nógvir føroyskir sjómenn sigla í øðrum londum (og um gjørligt hvar)
- Hvussu stóra inntøkur hava hesir
- Hvussu er talið av sjómonnum broytt tey seinnu árini
- Hvussu er inntøkan broytt tey seinnu árini
- Hvørja ávirkan hava inntøkurnar hjá hesum sjómonnum á lands- og kommunalbúskapin

Kanningin kemur eisini at fevna um onnur arbeiðsmarknaðarviðurskifti.

Tað eru Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur og Dennis Holm, samfelagsfrøðingur sum vegna Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning standa fyri kanningini.

Úrslitið av kanningini fyriliggur um mánaðarskiftið august / september.

## Vøkstur í skattainntøkunum hjá Hvalbiar Kommunu

Hvalbiar kommuna hevur ein vøkstur í skattainntøkunum fyrra hálvár 2009 uppá 3,14 prosent í mun til 2008. Tað skrivar Hvalbiar Kommuna á heimasíðu sínari. Nú fyribils skattatølini fyri fyrra hálvár 2009 eru innkomin, er munandi vøkstur í skattainntøkunum hjá Hvalbiar Kommunu í mun til 2008. Hóast tað er kreppa rundanum okkum, so er ein vøkstur uppá umleið 262.000 krónur ella 3,14 prosent higartil í 2009.